| Gerðabók býráðsins | |
|---|---|
| Fundardagur: | 03. september 2014 |
| Býráðsfundur nr. | 10/2014 |
| Borgarstjóri | Sonni á Horni |
| Fundarskrivari | Jákup Frants Larsen |
| | |

Ár 2014 tann 03. september kl. 16.30 varð býráðsfundur hildin í býráðssalinum, hetta sambært skriv frá borgarstjóranum, dagfest 29. august 2014 um innkalling til fundar. Fundurin, sum ásettur varð at verða 28. august 2014 varð avlýstur og nýggjur fundur lýstur at verða 03. september, hetta vísandi til kunngerð, dagfest 22. august 2014.

**Møtt vórðu:**

Sonni á Horni
Magnus S. Midjord
Sigga Óladóttir Joensen
Sigurð S. Simonsen
Dánjal Vang
Petur Abrahamsen
Eyðun á Lakjuni
Árant Berjastein
Birgir Petersen

**Skrivari:** Jákup Frants Larsen, býráðsskrivari

**Mál nr. 28/2014.**

**Viðvíkjandi 2. Viðgerð av eykajáttan til restandi peningi á fíggjarætlanini hjá sosialu nevndini.**

Fuglafjarðar kommuna/fíggjarnevndin hevur móttikið skriv frá sosialu nevndini, dagfest 12. mai 2014, við frágreiðing um at játtanin hjá nevndini ikki strekkir til tær ætlanir nevndin hevur, og loyvir nevndin sær tessvegna at heita á fíggjarnevndina, um at taka undir við tilmælinum um at fáa hækka fíggjarætlanina fyri 2014.

Útskrift frá fundinum í Sosialu nevndini, sum var tann 05. mai 2014: Sosiala nevndin samtykti at skeltir skula á barnagarðarnar og á demensheimið. Irena hevur kanna hjá Mikalina glas, hvat tað kostar at fáa hana at gera "stuttligar bókstavar", prikkutar, strípútar til stovnarnar.

Til demensheimið skal nevndin biða Óla Skarðhamar gera eitt skelti, sum líkist tí í Vesturstovu . Nøvnini koma at kosta uml. kr. 10.000 krónur pr. navn. Avgjørt er eisini at Stropin og Kambur skula hava skelti á teirra stovnar.

Sosiala nevndin umhugsar at avdúka nøvnini, tá ið Mentanarvikan verður í september 2014. Sosiala nevndin biður um eykajáttan á kr. 40.000.

Sosiala nevndin er samd um at heita á fíggjarnevndina, um at taka undir við tilmælinum, og játta kr. 40.000 til navnaskeltir til dagstovnin í Fuglafirði, dagtilhaldið fyri dement í Fuglafirði, Stropan og Kamb á Kambsdali. Kr. 25.000 til sertørv og serflutning og kr. 5.000 til námsferð hjá Sosialu nevndini til Suðuroyar.

Sosiala nevndin viðgjørdi málið á fundi tann 05. mai 2014 og heitir á fíggjarnevndina, um at játta tilsamans kr. 70.000 til endamálini.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 14. mai 2014 og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan á kr. 70.000,00 til rakstur og íløgur hjá sosialu nevndini fyri fíggjarárið 2014, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. mai 2000 um kommunustýri.

Staðfest er, at kr. 60.000,00 eru avsettar til sosialu deildina til rakstur á rakstrarstaði 01.11.14.530.1223.530.10 á konto 141001: "Keyp av vørum og tænastum", og við eini eykajáttan upp á kr. 30.000,00 verður upphæddin broytt til kr. 90.000,00. Talan verður her um játtan til sertørv kr. 25.000,00 og kr. 5.000,00 til námsferð hjá nevndini til Suðuroyar.

*Viðvíkjandi eykajáttan til íløgur/rakstur stovnar í navnaskeltir verða hesar útgreinaðar soleiðis:*
Íløga í dagstovnin í Fuglafirði til navnaskelti kr. 10.000,00 verður játtað til rakstrarstað 03.26.11.531.20 konto 310001, har eingin peningalig játtan fyriliggur í 2014.

Íløga í Stropan til navnaskelti kr. 10.000,00 verður játtað til rakstrarstað 03.26.11.531.10 konto 310001, soleiðis at játtanin í 2014 verður hækkað úr kr. 300.000,00 upp í kr. 310.000,00 í 2014.
Rakstur til viðlíkahald av dagtilhaldinum fyri dement (læknahúsini) til navnaskelti kr. 10.000,00 verður játtað til rakstrarstað 06.11.31.530.10 konto 160001, har avsettar eru kr. 320.000,00 í 2014, og verður játtanin sostatt hækkað upp í kr. 320.000,00.

Fíggingin verður fingin til vega av meirinntøku av kommunuskatti, rakstrarstað 20.52.11.530.01 konto 610001, hetta vísandi til grein 41, stk. 2 í omanfyri standandi lóg (kommunulógini).
Ein eykajáttan, sum henda, førir eina útreiðslu við sær, sum hevur beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2014.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17 mei 2000 um kommunustýri, og skal endaliga avgerðin verða kunnað Fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftaná samtyktina við 2. viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

Málið hevur verið til viðgerðar á býráðsfundi 19. juni 2014 og varð samykt at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð av eykajáttanini á komandi býráðsfundi. (9-0).

**Avgerð:**
Samtykt varð við 2. viðgerð at veita eykajáttanina til sosialu nevndina, hetta sambært tilmælinum frá fíggjarnevndini. (9-0).

## <u>Mál nr. 29/2014</u>

**Viðvíkjandi íløgum í tannlæknaútgerð.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið skriv frá Mortani í Hamrabyrgi, tannlækna, dagfest 17. august 2014 um viðurskifti í sambandi við uppstigan av tannlæknastovuni, har greitt verður frá, at hann hevur sett 2 starvsfólk aftrat í sambandi við privatpraksis.

Saman við skrivinum eru tilboð upp á nýggja útgerð, somuleiðis sum hann lýsir verandi amboð á tannlæknastovuni, sum møguliga koma at verða yvirtikin frá Tannlæknastovuni v/Steintór Larsen. Talan er um nýggjan tannlæknastól við tilhoyri, *súgvimotor, røntgen-sensor og 1 operatørstól aftrat.*

Talan verður um eina samlaða íløgu upp á kr. 625.000,00, og staðfest er á fundi í fíggjarnevndini 21. august 2014, at eingin peningur til íløgur í tannlæknastovuna er avsettur á fíggjarætlan kommununar fyri 2014 og tí verður neyðugt við eini eykajáttan, um útgerðin skal verða keypt í inniverandi fíggjarári.

Fundur hevur annars verið millum fyrisitingina og umboð fyri Steintór Larsen um møguligan kostnað fyri keypi av amboðunum, sum ídag eru á tannlæknastovuni, og sum eru ogn hjá SP/F Tannlæknastovuni í Fuglafirði. Kommunan hevur fingið eitt yvirlit yvir amboðini við nývirði og avskrivingum. Jan Otto játtaði at venda aftur við einum uppskoti, so støða kundi verða tikin til møguligt keyp.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi 21. august 2014 og varð avgerð tikin um at útseta endaligu viðgerðina av hesum máli til seinni fund, eitt nú grundað á, at endaligt tilboð ikki enn er innkomið frá Jan Otto Holm upp á brúktu tannlæknaútgerðina hjá Tannlæknastovuni.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini 28. august 2014 og mælir nevndin býráðnum til at veita eina eykajáttan upp á kr. 625.000,00 til íløgur í útgerð í kommunalu tannlæknastovuna fyri fíggjarárið 2014, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. Mai 2000 um kommunustýri.

Staðfest er, at eingin upphædd er avsett á fíggjarætlan kommununar fyri 2014 í íløgur í útbúnað til tannlæknastovuna, og við eini eykajáttan verður upphæddin sostatt broytt úr kr. 0,00 til kr. 625.000,00 og verður sostatt neyðugt at upprætta nýtt rakstrarstað á øki 2 "Almanna- og heilsumál", eins og nýtt kontonummar.

Fíggingin verður fingin til vega av meirinntøku av kommunuskatti, rakstrarstað 20.52.11.530.01 konto 610001, hetta vísandi til grein 41, stk. 2 í omanfyri standandi lóg (kommunlógini).

Ein eykajáttan sum henda, førir eina útreiðslu við sær, sum hevur beinleiðis ávirkan á roknskap kommununar fyri 2014.

Tá ið talan er um eina eykajáttan, skal málið hava 2 viðgerðir í býráðnum við í minsta lagi 14 daga millumbili, hetta sambært § 41, stk. 2 í løgtingslóg nr. 87 frá 17. Mai 2000 um kommunustýri, og skal

endaliga avgerðin verða kunnað Fíggjarmálaráðnum í seinasta lagi 3 dagar aftaná samtyktina við 2. Viðgerð, hetta sambært § 53, stk. 2,3 í somu lóg.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini og beina málið til 2. og endaliga viðgerð á komandi býráðsfundi. (9-0).

**<u>Mál nr. 30/2014.</u>**

**Viðvíkjandi leið 410 Kambsdalur-Fuglafjørður-Kambsdalur.**

Fuglafjarðar kommuna hevur móttikið teldupost frá Strandfaraskip Landsins, dagfest 31. juli 2014 saman við uppskoti til sáttmála partanna millum um royndarskipan restina av árinum 2014 um flutning av íbúgvum millum Fuglafjørð og Kambsdal við leið 410 eftir galdandi ferðaætlan.

Henda avtala inniber, at flutningurin verður ókeypis fyri borgarar, tó undantikin teir næmingar, sum ganga á miðnámsskúlunum á Kambsdali.

Avroknað verður mánaðarliga afturút eftir nýtslu á leiðini við galdandi ferðaseðlaprísum. Við tað at kommunan ikki hevur yvirlit yvir nýtsluna undanfarnu ár, so hevur fyrisitingin heitt á SSL um at koma við einum yvirliti skjótast. Hesi viðurskifti eru grundað á, at kommunan á fíggjarætlanini fyri 2014 bert hevur avsett játtan til sín part av samstarvsavtaluni fyri leið 410 og ikki fyri tann eykakostnað, sum nýggja skipanin kemur at geva kommununi.

Neyðugt verður tí við eykajáttan, soleiðis at játtan fyriliggur til flutningin. Staðfest er tó, at pr. d.d. er ikki meirnýtsla framd á játtanini til leið 410.

Nevndin samtykti á fundi 21. august 2014 at útseta endaligu viðgerðina til komandi nevndarfund.

Kommunan hevur tann 27. august 2014 móttikið uppgerð frá Strandferðsluni um nýtsluna á farleiðini, og vísir seg, at henda skúladagar frá 01. august 2013 til 30. juni 2014 hevur verið um 9.000 ferðandi tilsamans. Talan er um 4.000 ferðandi skúlabørn til og av Kambsdali, 2.000 miðnámsnæmingar og 3.000 sum fella uttan fyri hesar skipanir.

Í hesum viðfangi skal verða nevnt, at skúlabørnini av Kambsdali, sum ganga í skúla í Fuglafirði hava bussskort, sum rindað verður fyri, og at næmingar í miðnámsskúlunum hava busskort, har Studni veitir næmingunum nærum fullan ferðastuðul.

Staðfest er, at avsettar eru kr. 650.000,00 í fígggjarætlan kommununar fyri 2014, og at sáttmálin við Strandferðsluna er upp á kr. 614.000,00, og er sostatt ein munur á kr. 36.000,00, sum kann verða nýttur til at rinda fyri tann ókeypis flutning, sum kommunan kemur at rinda fram til 31. desember 2014.

Mett verður sostatt, at ikki verður neyðugt við eini eykajáttan fyri fíggjarári 2014 til eykakostnaðin av royndarætlanini fyri ókeypis flutningin við 410 millum Kambsdal-Fuglafjørð-Kambsdal.

Fíggjarnevndin hevur viðgjørt málið á fundi tann 28. August 2014 og mælir býráðnum til at góðkenna sáttmálan millum kommununa og Strandfaraskip landsins um "flutning við leið 410".

Somuleiðis varð avgerð tikin um at taka upp fund við leiðaran á Studna um viðurskiftini viðvíkjandi viðurskiftunum hjá næmingunum á miðnámsskúlunum á Kambsdali í sambandi við endurgjald fyri ferðastuðul.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá fíggjarnevndini. (9-0).

**<u>Mál nr. 31/2014.</u>**

**Víðkan av Fuglafjarðar havn.**

Ásannandi at eingin ivi er longur um, hvat mest átrokandi arbeiði hjá Fuglafjarðar havn er at fáa gjørt, so mælir vinnunevnin býráðnum til á fundi 22. august 2014, at ein umraðfesting verður gjørd soleiðis, at farið verður undir at leingja frystikeiina einar 60 til 70 metrar heimeftir.

Nevndin mælir somuleiðis til, at um ein umraðfesting verður gjørd, so verður arbeiðið við leingjan av frystibryggjuni gjørt áðrenn fóðurbryggjan.

Verður játtanin, sum er til fóðurbryggjuna flutt til hetta arbeiðið, verður mett, at írestandi fígging verður umleið kr. 7,2 mió.

Nevndin metir, at øktu inntøkurnar í sambandi við hesa havnabygging verður afturgoldin áðrenn 3-4 ár eru farin.

Býráðið hevur á fundi tann 31. oktober 2013, sí j.nr. 13/00009 tikið avgerð um eftir tilmæli frá vinnunevndini at fara undir grótfylling og gerð av 30 metra bryggju í sambandi við umsókn frá P/F Havsbrún um lendi undir nýggjari fóðurgoymslu á havnarøkinum.

Sambært kostnaðarmeting verður arbeiðið mett til kr. 15,0 mió, og vórðu kr. 10,1 mió. Avsettar á fíggjarætrlan kommununar fyri 2014. Sambært samtyktini frá 31. oktober 2013, so skuldu tær 10,0 mió kr. verða fíggjaðar við framflyting av kr. 5,0 mió. frá 2013, játtan í 2014 upp á kr. 5,0 mió. og at restupphæddin kr. 5,0 mió kundi verða fingin til vega við láni frá Havsbrún og Bergfrost ella við lántøku úr fíggingarstovni.

Staðfest er pr. d.d., at nýttar eru kr. 6,7 mió til íløguna, og í hesi upphædd er spurnsjarnið, sum kommunan hevur keypt íroknað. Prísur kr. 1,7 mió. Kommunan hevur boðið arbeiðði við bryggjuni út, og er avgerð tikin um at taka av tilboði frá P/F J & K Petersen, dagfest 30. apríl 2014 upp á kr. 5.659.823,00, men staðfest er, at um arbeiðið skal verða gjørt í inniverandi fíggjarári, so kemur íløgan í havnina at verða tilsamans kr. 12.559.823,00, sum er kr. 2.459.823,00 omanfyri játtanina.

Sostatt er longu staðfest, at kostnaðurin av havnagerðini kemur at verða umleið kr. 700.000,00 størri enn mett ella tilsamans kr. 15,7 mió.

Avtala er gjørt við P/F J & K Petersen um, at restupphæddin verður rindað og avsett á fíggjarætlan kommununar í fíggjarárinum 2015, og at sáttmáli verður undirskrivaður fyrst í komandi viku.

Um játtanin verður flutt frá verandi íløgu yvir í leingjan av frystibryggjuni, so verður íløgan í verandi havnagerð minkað við kr. 1,7 mió fyri spunsjarnið, sum løgd skal verða omaná tær kr. 7,2 mó., sum neyðugar verða at fáa til vega, um so verður, at frystibryggja skal verða longd.

Sosatt verður kostnaðurin av gangandi havnabyggging fyri 2014 staðfestur til at verða kr. 5,0 mió, meðan íløgan í frystibryggjuna verður mett til kr. 8,9 mió. (2014-2015). Samlað íløga í havnabyggingar kr. 13,9 mió, um umraðfestingar verða gjørdar og arbeiðið við verandi grótfylling verður støðgað. Um arbeiðið við grótfyllingini skal halda frá í ár og í 2015, so skulu nýtast kr. 10,7 mió. aftrat í grótfylling og bryggju, so talan verður um íløgur upp á tilsamans kr. 24,6 mió.

Fyrisitingarliga verður viðmerkt, um vinnunevndin í hesum máli hevur tosað við P/F Havsbrún um uppskotið, og hvat virkið sigur til, at ein umraðfestin verður gjørd, sum møguliga kann koma at seinka arbeiðinum við bryggjuni og grótfyllingini, um so verður at neyðug játtan ikki kemur at fyriliggja til arbeiðið.

Málið hevur verið til viðgerðar á fundi í fíggjarnevndini tann 28. august 2014, og mælir nevndin býráðnum til ikki at taka undir við tilmælinum frá vinnunevndini um umraðfestingar, soleiðis at arbeiðið við leingjan av frystibryggjuni verður gjørt áðrenn fóðurbryggjan.

Somuleiðis mælir nevndin býráðnum frá at veita eina møguliga eykajáttan fyri 2014 til frystibryggjuna upp á kr. 7,2 mió. Nevndin heldur fast við, at íløgan, sum samtykt er av býráðnum tann 31. oktober 2013 í øki til fóðurgoymsluna hjá Havsbrún og bryggju skal halda fram, áðrenn farið verður undir aðrar havnaútbyggingar.

**Avgerð:**
Broytingaruppskot frá Sigurð S. Simonsen: "Miðað verður fram ímóti at fáa gjørt frystibryggjuna fyrst, og at farið verður í holt við hetta arbeiði straks. Um so er, at samtykta havnavíðkanin í sambandi við fóðurgoymslu III hjá Havsbrún á ongan hátt kann bíða, eigurhon at verða gjørd liðug í inniverandi ári. Uppskotið fall. (4 atkv. Fyri og 5 atkv. Ímóti. Ímóti atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Árant Berjastein, Petur Abrahamsen og Dánjal Vang).

Atkvøtt varð so um tilmælið frá vinnunevndini. Uppskotið fall. (. (4 atkv. Fyri og 5 atkv. Ímóti. Ímóti atkvøddu Sonni á Horni, Sigga Óladóttir Joensen, Árant Berjastein, Petur Abrahamsen og Dánjal Vang).

At enda varð atkvøtt um tilmæli frá fíggjarnevndini og varð hetta samtykt. (5 atkv. fyri og 4 atkv. ímóti. Ímóti atkvøddu Sigurð S. Simonsen, Eyðun á Lakjuni, Magnus S. Midjord og Birgir Petersen).

**<u>Mál nr. 32/2014.</u>**

**Viðvíkjandi skúlasamstarvi við Eysturkommunu.**

Fundur hevur verið 28. august 2014 millum býráðið, umboð fyri Eysturkommunu og arbeiðsbólk, sum millum annað hevur gjørt tilmæli um framhaldsdeild og skúlaviðurskifti í Eystyrkommunu, og sum handað varð býráðnum fyri Eysturkommunu tann 30. juni 2014.

Á fundinum luttóku limir í arbeiðsbólkinum, eins og fokvinnan fyri skúlastýrinum og skúlaleiðslan við Fuglafjarðar skúla eisini varð á fundi.

Umboð fyri arbeiðsbólkin gjøgnumgingu tilmæli við powerpoint, somleiðis sum undirliggjandi skjøl til ávísar partar eisini vórðu útflýggjað á fundinum. Eftir at framløgan varð liðug vórðu umrøður, spurningar settir, ein og allir býráðslimir fingu hvør sítt eintak av tilmælinum útflýggjað í pappírformi.

Býráðið í Eysturkommunu tekur undir við tilmælinum frá arbeiðsbólkinum og ynskir, at kunningar- og hoyringartilgongdin verður sett í gongd sum skjótast.

Býráðið er eisini samt um, at útgangsstøði er verandi samstarv við Fuglafjarðar kommunu, og at Eysturkommuna ynskir at kanna møguleikar í tilmælinum um framhaldsdeildina saman við Fuglafjarðar kommunu.

**Avgerð:**
Samtykt varð at taka undir við tilmælinum frá arbeiðsbólkinum og avgerðini hjá Eysturkommunu, at kunningar- og hoyringstilgongdin verður sett í gongd sum skjótast.

Somuleiðis varð býráðið samt um at taka undir, at útgangsstøði er verandi samstarv millum Fuglafjarðar- og Eysturkommunu, og at møguleikarnir í tilmælinum um framhaldsdeildina saman við Eysturkommunu verða kannaðir. (9-0).

Bókin lisin. Fundurin lokin kl. 19.30.

Magnus S. Midjord

Sigga Óladóttir Joensen

Dánjal Vang

Eyðun á Lakjuni

Petur Abrahamsen

Sigurð S. Simonsen

Árant Berjastein

Birgir Peteresn

Sonni á Horni

Skrivari:

Jákup Frants Larsen